



# Einar er framvegis gulur



*Einar Hansen og formaðurin hjá NSÍ, Andrias Lamhauge, tykjast báðir vera nøgdir, nú undirskriftin er komin upp á pláss*

Í Runavík eru tey eins og flestu aðra staðni kring landið í ferð við fyrireikingarnar til komandi kappingarár.

Ein av spælarunum, sum veruliga gjørdi um seg í fjør, er 17 ára gamli Einar Hansen, sum eisini hevur verið fastur fúsur á føroysku U-landsliðunum seinnu árini.

Tí er einki at ivast í, at bæði felag og viðhaldsfólk eru fegin um, at NSÍ og Einar nú hava givið hvørjum øðrum pappír upp á framhaldandi samstarv.

Um tað so verður NSÍ alt árið, er so ein annar spurningur. Einar er ein av fleiri føroyskum spælarum, sum útlendskir fótbóltsskótar hava lagt til merkis, og hann hevur eisini longu nú verið til venjingar hjá onkrum útlendskum liði.

Men fyribils verður tað so hjá barndómsfelagnum, at hann fer at gera um seg.

-mørk

FO-DK konsertferð

Peter Smith





Deja Vu

**Kaggin:**
Hós. 24. nov. kl. 20.00

**Stóra Pakkhús:**
Frí. 25. nov. kl. 21.00

**Atlantis:**
Leyg. 26. nov. kl. 19.00

Kostnaður: **90,- kr**
**Lesandi ½ prís**
Ókeypis kaffi/té og vaflur
Atgongumerki fáast við dyrnar

Fyriskipað av:
Norðurlandahúsinum, FUT, DJBFA og DAF
*Stuðlað av Atlantic Airways*

GRAFIK STUDIO

norden

Í BÝIN

heldur fram á síðu 38–39

# Mistu men gingu fram

**Hóast Føroyar hava mist seks stig á styrkislistanum hjá FIFA, so gekk fótbóltslandsliðið trý pláss fram á listanum**

FIFA-STYRKISLISTIN
*Jákup Mørk*

At Føroyar gingu fram á listanum hesaferð, kemst einamest av, at tað vóru aðrar tjóðir, sum mistu fleiri stig enn okkara farna mánaðin.

At farið verður út um oktober mánað merkir, at stigini, sum eru vunnin fyri fimm árum síðani um hetta leitið gerast alt minni verd, og tí minkar sonevndi koefficenturin hjá Føroyum.

Lítið er at ivast í, at skulu Føroyar aftur vinna seg nakað uppeftir á listanum, so er at vóna, at lukastið til komandi EM-undankapping sendir okkum í ein av størru bólkunum. Tað stendur longu greitt, at bólkarnir hesa ferð verða nakað størri, enn teir hava verið, og tí kemur í øllum førum eitt lið át vera í okkara bólki, har vit eiga at hava ein hampuliga góðan møguleika. Og gerst talan um ein av størru bólkunum, so kann talan - við nakað av hepni í lutakastinum - gerast um tvey slík mótstøðulið.

Á toppinum á listanum er størsta broytingin hesafeðr, at Kekkia er farið fram um Holland á øðrum plássinum. Sæð burtur frá mest sum suverena oddasessinum hjá Brasilia, so er talan tó um sera harða kapping um ovastu plássini. Bara fimm stig eru á muni millum nummar tvey og trý. Og millum nummar fýra og nummar átta eru bara seks stig.

Seinasti styrkislistin sær soleiðis út. Tølini í klombrum siga frá, hvørja støðu londini høvdu á listanum fyri oktober mánað:

| Nr | Land | Stig |
|---|---|---|
| 1 (1) | Brasila | 841 |
| 2 (3) | Kekkia | 796 |
| 3 (2) | Holland | 791 |
| 4 (4) | Argentina | 774 |
| 5 (5) | Frakland | 772 |
| 6 (8) | Spania | 771 |
| 7 (6) | Mexico | 768 |
| 8 (7) | USA | 766 |
| 9 (9) | Ongland | 757 |
| 10 (9) | Portugal | 754 |
| 13 (14) | Danmark | 732 |
| 14 (13) | Svøríki | 731 |
| 38 (37) | Noreg | 649 |
| 45 (44) | Finnland | 619 |
| 93 (92) | Ísland | 487 |
| 313 (134) | Føroyar | 332 |

fk Matseðilin

*Hósdag 24. november*
**Revelsbein - Oksasteik**

*Fríggjadag 25. november*
**Lasagna - Nakkafilét**

*Leygardag 26. november*
**Enskur búffur**

*Mánadag 28. november*
**Medistarpylsa - Fiskafrikadellur**

*Týsdag 29. november*
**Hakkibúffur - Høsnarungabringa**

*Mikudag 30. november*
**Stoktur kalvi - Hamburgarryggur**

**2 sløg av salat**

*Tilber at keypa døgurða við heim*

**Matstovan í Hoyvík**



BÍLEGG PIZZA
FRÍGGJANÁTT
OG
LEYGARNÁTT



HEIMKOYRING ALLA NÁTTINA

PIZZA 67

TEL. 35 67 67



